# gja tinghúsið út




*Bygningurin verður á Eystaru Vág og sjálvur salurin verður á Bursatanga, sigur Palli Gregoriussen, arkitektur*



*Bygningurin er í trimum hæddum umframt parkeringskjallara og loft. Í parkeringskjallaranum verður rúm fyri 52 bilum*



*Vestantil verður eitt framhald av Áarvegnumut á Bursatanga. – Har fer at bera til at sita og njóta góða sólargangin og at keypa sær ein bita. Á veghæddini verður ein stór framsýningarhøll, sum fólk kunnu brúka, sigur Palli Gregoriussen, sum ynskir eitt livandi umhvørvi framman fyri nýggja tinghúsinum*



*Inni í salinum er ætlanin at tinglimirnir sita í einum hálvsirkli í trimum hæddum. Íblásturin kemur úr gamla Grikkalandi. Hann heldur, at hetta hevur verið ein sera spennandi avbjóðing, sum kann tilføra býnum nýtt lív. - Her er talan um býarlív og býarbygging, sigur Palli Gregoriussen. Eitt stórt listaverk skal prýða sjálvan Bursatanga. Her við einum obeliski sum dømi*







*Teir tríggir, Palli Gregoriussen, Edmund Joensen og Heðin Mortensen siga allir, at Føroya Løgting er elsta ting í Europa.*
*- Tí skulu vit eisini tora at hugsa stórt, sigur Edmund Joensen, sum ikki ætlar at nýggja tinghúsið skal ávirka fíggjarlógina, men at tað verður kapitaliserað við sølu av gamla tinghúsið*